Tríggjar konsertir í Orfeus

Orfeus konsertrøðin fer nú undir sítt fjórða starvsár, og tað verða tríggjar spennandi konsertir fyri jól

Ninu Kavtaradze

Nikolaos Kapnas

Stamen Stantchev

Orfeus, konsertfelag Norðurlandahúsins, fer nú undir vetrarskránna. Allar konsertirnar verða hóskvøld kl. 20.00. Sum nakað nýtt verða tær einstøku konsertskráirnar umrøddar sama kvøld kl. 19.30.

Nina Kavtaradze

Fyrsta konsertin verður við russiska klaverleikaranum Ninu Kavtaradze hóskvøldið 9. oktober. Hon fer at spæla tónleik úr romantiska tíðarskeiðnum. Á skránni hevur hon verk eftir Tchaikovsky, Rachmaninov, Wagner, Chopin og Musorgsky. Harumframt fer Nina Kavtaradze at spæla verkið Nostalgisk Tango, sum hon hevur skrivað sjálv.

Nina Kavtaradze hevur hildið konsertir víða um í heiminum. Hon hevur m.a. starvast saman við so frægum tónlistarfólki sum Jurij Ahronovich, Kurt Sanderling, Mariss Jansons og Jean-Pierre Rampal. Fløguuppløka hennara av klaververkum eftir Richard Wagner varð í tíðarritinum "Neue Musikzeitschrift" (stovnað av Robert Schumann) kosin at vera millum tíggju tær bestu klaverútgávurnar í heiminum í ár 2000.

Nikolaos og Stamen

Onnur konsertin verður hóskvøldið 30. oktober. Tá fara Nikolaos Kapnas og Stamen Stantchev á pallin við tónleiki fyri violin og klaver, sum er skrivaður í Fraklandi. Nikolaos og Stamen hava áður spælt í Orfeus konsertrøðini, og hesaferð verður tað við verkum eftir Debussy, Stravinsky og Saint-Saens.

Norðurlendsk trio

Triðja og seinasta konsertin fyri jól verður hóskvøldið 20. november. Tá fer ein trio, sum er mannað við Marianne Rørholm, messosopran, Anette Maria Slaatto, viola-leikara og Anne Mette Stæhr, klaverleikara at spæla nýggjari norðurlendskan kamartónleik. Á skránni hjá teimum eru tónleikur m.a eftir íslendska tónaskaldið Atla Heimir Sveinsson og eftir Sunleif Rasmussen. Atli Heimir og Sunleif hava tað felags, at báðir hava vunnið ta høgt virdu Tónlistarvirðisløn Norðurlandaráðsins. Atli Heimir í 1976 fyri sermerktu floytukonsert sína og Sunleif í 2002 fyri fyrstu symfoni sína "Oceanic Days". Trioin fer harumframt at spæla verk eftir Anders Brødsgaard úr Danmark og Johannes Jansson úr Svoríki.

Atgongumerki

Norðurlandahúsið fer til hesar tríggjar konsertirnar at hava øðrvísi atgongumerkjaprísir enn vanligt hevur verið. Atgongumerki til tær einstøku konsertnir kosta kr. 125, - fyri hvørja, men til ber at keypa til allar tríggjar konsertirnar fyri kr. 175,-. Í báðum førum er umrøðan kl. 19.30 íroknað.

EG MEINI TAÐ

Er tað ov lætt at vera journalistur í Føroyum?

Bergur Rasmussen skrivar

Í Degi og Viku fyri einari góðari viku síðani sat ein floksformaður á tingi og umbar seg fyri ein heldur kloddutan atburð á almennari samkomu við útlendskum gestum. — Orð sum "rúsdrekka", "álit" og "trupulleikar" blivu nevnd. — Tað var so tað, tað var!

Innslagið var í mínari verð hvørki serliga skelkandi ella áhugavert, eftir sjálvari "gøluni" at døma, tí hetta var hvørki fyrstu ella einastu ferð, og sannlíkt er, at tað heldur ikki verður seinastu ferð, at menn í fyllskapi gera sær fyri skommum, hvørki í almennum høpi ella privat. — So tað lati eg fara framvið ...

Nei, tað ið fangaði mín áhuga og irriteraði meg serliga nógv var klodduta og amartørsliga innslagið í Degi og Viku hetta hóskvøldið.

Hevði innslagið yvirhøvur eitt tíðindavirði, sum rættvísgjørdi, at floksformaðurin fekk eina einarødu í SvF uppá knappar 8 minuttir? — Serliga tá ið man hevur í huga, at sjónvarpstíðindini sjáldan eru nógv longri enn 20 minuttir tilsamans, og tá eru jingla, yvirskriftir og veðrið við í roknistykkinum!

Um tað var ein roynd hjá journalistinum at lyfta onkra dýnu og síggja okkurt smuds, so riggaði tað ikki serliga væl! — Talan var jú um ein mann, sum so avgjørt dugir at svara fyri seg, og tá ið hann ongar kontraspurningar fekk, so misti innslagið sítt virði næstan beinanvegin, tí í somu stund hann viðgekk at hava gjørt eitt mistak, so átti møguliga at verið kutað yvir í eitt yvirlit av gomlum gølum og møguliga eitt prát við okkurt fakfólk. Og at enda kundi óhepni politikarin fingið loyvi til at síggja angrandi út og siga "at tað ongantíð skal henda aftur!"

Ella okkurt! Tí hvat nyttar tað at servera eitt so langt innslag, tá ið tað mest av øllum líktist mikrofonhaldarii? — Vit eru jú nøkur, sum hyggja eftir Degi og Viku fyri at fáa nakað at vita, og ikki bara tí at sendingin er føroysk!

Sum miðlabrúkari her í landinum hevur man tó av og á hug at spyrja, um landið er ov lítið til eina atfinnandi, gravandi pressu?

Bløðini hava sum frægast roynt at hevjað seg uppum partapolitisku síðvenjuna, men eftirsum tey meira og meira noyðast at klára seg eftir marknaðartreytum, so verður lægst møguligi felagsnevnarin rættiliga ofta lyklaorðið, tí so nógv sum gjørligt skulu jú keypa blaðið, ikki bara í dag, men helst eisini í morgin. Og tí verður lopið frá gølu til gølu, kryddað eitt sindur við ítrótti og glæsiligum hetjusøgum um føroyingar, ið royna seg við hesum ella hasum í tí stóru verðini handan tað blýgráa havið.

Hetta átti tó ikki verið neyðugt hjá útvarpi og sjónvarpi, ið skuldu eitast at vera loyst frá hesi jagstranini eftir tíðindum, ið kunnu metast eftir søluvirðinum, tí hvørt húsarhald í landinum er við til at fíggja hesar stovnar, umframt at teir hava rætt til at senda lýsingar og at skipa fyri eydnuspølum.

Og tó vit hava jú havt politikara her í landinum, ið beinleiðis hevur hótt við at skerja játtanina til "tey óheftu", um ikki loftmiðlarnir góvust við einari snaskutari søgu úr fortíðini. Nei, tað er ikki serliga langtsíðani!

Journarlisturin hevur til fremstu uppgávu at royna at finna fram til eitt ávíst mát av sannleika, ið hann so ber fram fyri fólki. Men um hann ikki viðger tilfarið, áðrenn fjøldin fær tað, so kundi hann tað sama bert sent ein bandupptakara fyri seg ella ein filmsupptakara. — Journalisturin hevur eisini eina ábyrgd!

Men sjálvandi, vit kenna jú øll hvønn annan, og fær journalisturin, sum jú skal liva av at skriva tíðindir hvønn dag, tað orð á sær, at hann (orðið er kallkyn, sorry) er so mikið droyur, at hann altíð leitar fram gølur og annað snask, so er vandin tilstaðar, at eingin vil tosa við viðkomandi, og hvat er tá vunnið hjá fríu pressuni?

Spurningurin er so, um Føroyar eru ov smáar til journalistik?

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

Kærkomið køksævintýr hjá komandi kokkum

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út bókina Kókibókin hjá komandi kokkum eftir Jane Bull.

Hetta er ein fitt og spennandi kókibók til børnini, har hugflogið fær rúmar ræsur. Bókin er full av frálíkum rættum, mennandi millummálum og spennandi søtmeti. Evna til eina leskiliga runukaku, broysknar mánasteinar ella litfagrar ælabogakøkur.

Loynidesert og jarðberja- og rómadrykk. Í bókini eru spennandi, sunnir, súrir, saltir og søtir smámálar. Kærkomið køksævintýr hjá komandi kokkum.

Bókin er øll myndprýdd, so tú stig fyri stig sært, hvussu tú skalt bera teg at, hvussu tú kemur í gongd, hvussu amboðini eita, og hvussu tú ansar tær í køkinum, tá tú matger. Jane Bull hevur skrivað og Sólgerð Sigvardsen týddi

Bókin er 48 síður, innbundin, og kostar kr. 98,-.

Hugo endurprentaður

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út bókina Tey kalla meg bara Hugo eftir Rakel Helmsdal. Hetta er 2. broytta útgáva



Fittu søgurnar um Hugo eru væl umtóktar millum børn. Nú hevur Bókadeild Føroya Lærarafelags givið fyrstu bókina, Tey kalla meg bara Hugo út av nýggjum, í eitt sindur broyttari útgávu og við nýggjari permu, sum Philippe Carré hevur teknað.

Bøkurnar um Hugo eru um vinarlag fyrst og fremst, men eisini um happing. Frá tí degi, at Elo Skjálm setur føturnar inn í flokkin hjá Hugo og teimum, verður lívið hjá Hugo vent upp og niður, og besti vinur hansara verður ringasti figgindi, og allur skúlin er eftir honum. Fløkjurnar vinda uppá seg, og at enda eru tað bara útskotini í býnum, Landastrokini, ið kunnu loysa knútarnar. Hetta er ein søga um vinarlag, og um at fólk ikki altíð eru tað, tey síggja út til at vera, og serliga ikki, hvat onnur halda tey vera.

Bókin er 214 síður, innbundin og kostar kr. 140.

Tey kalla meg bara Hugo er fyrsta bókin í røðini um Hugo. Í 1997 gav Bókadeild Føroya Lærarafelags út framhaldið av henni, Hvørjum flenna likkurnar at, Hugo. Og um ein mánaða ella so kemur triðja bókin í røðini, Kom yvirum Hugo. Eisini henda bókin er um vinalag. Bøkurnar kunnu eisini lesast leysar av hvør aðrari.

Blómubros

Løg fyri floytu. Við nýggja heftinum fáa føroysk børn høvi at venja seg við "føroyskan tóna", sum vit serliga hoyra í skjaldrum, kvæðaløgum og sálmum.

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út Blómubros, ið er savn við føroyskum løgum skrivað niður á nótablað og løgd til rættis fyri floytu. Andrea Heindriksdóttir, lærari í floytu í musikkskúlaskipanini, hevur lagt heftið til rættis. Blómubros er fyrst og fremst ætlað til tónleikaundirvísingina í musikkskúlaskipanini. Vónin er, at lítla lagasavnið verður góður stuðul í dagligu undirvísingini og til framførslur.

Útlendskar ljóðførisskúlar umfata barnasangir og fólkaløg úr upprunalandinum. Ofta verður svenskt, danskt og enskt tilfar nýtt í musikkskúlaskipanini. Føroysk børn venja seg tí frá byrjan við ein "fremmandan tóna". Við nýggja heftinum fáa føroysk børn høvi at venja seg við "føroyskan tóna", sum vit serliga hoyra í skjaldrum, kvæðaløgum og sálmum.

Í Blómubros eru 26 løg. Løgini umboða ymsar partar av føroyskari sangmentan. Her eru skjaldur, kvæða- og vísuløg, eldri og yngri barnasangir og nøkur gomul føroysk sálmaløg - kingoløg. Løgini eru í summum førum skrivað í tveimum tónasløgum, fyri næmingar á byrjanarstøði og fyri næmingar, ið hava ein ávísan førleika. Eisini eru fleiri løg lødd til rættis fyri 3 floytur, og upp aftur onnur hava klaverfylgispæl, sum klavernæmingar, ið eru komnir nakað ávegis, eru førir fyri at spæla. Sangtekstirnir eru prentaðir aftast í heftinum.

Atli K. Petersen hevur skrivað nótarnar. Astrid MacDonald hevur myndprýtt heftið. Grafikstudio hevur gjørt permuna, og Einars Prent hevur prentað.

Blómubros er 46 blaðsíður og kostar 98 krónur. Lítla lagasavnið fæst í bóka- og tónleikabúðum um alt landið.